# REGUR ÚT

*Ástaðarfundurin, sum Landsverk skuldi skipa fyri Inni í Dal á Sandi hin 16. september, hevur ikki verið, og einki útbjóðingartilfar er útflýggjað, soleiðis sum sagt varð í lýsingini hjá Landsverki*



## Dýrur rakstur av ítróttarhøll

**RAKSTUR** Kommunurnar í Sandoynni noyðast at finna útvegir fyri, hvussu tær skulu megna at rinda fyri rakstrarkostnaðin av ítróttarhøllini Inni í Dal

Vilmund Jacobsen

Verkætlanin við ítróttarhøllini, sum tað almenna skal byggja Inni í Dal á Sandi, kann í mest lagi kosta 27 miljónir krónur.

Í Sosialinum seinasta mikudagin, helt Gerhard Lognberg, løgtingsmaður og formaður í Sandoyar Skúlasambandi, at verkætlanin kanska kann fremjast fyri minni enn hesar 27 miljónir krónurnar, nú byggivinnan kanska ikki hevur so nógv um oyruni.

Gerhard Lognberg er eisini annað umboðið hjá Sandoyar Skúlasambandi í bygginevndini aftanfyri ítróttarhøllina.

Í blaðnum mikudagin visti hann eisini at siga, at bygginevndin á seinasta fundi setti sær fyri, at øll tilboð upp á liðugtgerð av ítróttarhøllini skulu verða komin Landsverki í hendi í seinasta lagi 1. desember í ár.

### Dýrt at reka

Eitt er so, hvat verkætlanin Inni í Dal kemur at kosta. Annað er, hvat ein ítróttarhøll kemur at kosta kommununum í oynni at reka.

Mett hevur verið, at samlaði rakstrarkostnaðurin fer at liggja um einar 600.000 krónur um árið, harav av nettoútreiðslurnar eftir hallarleigu helst verða einar 480.000 krónur um árið.

Soleiðis verður mett, at ítróttarhøllin fer at hava umleið 120.000 krónur í inntøkum um árið.

Kommunurnar í Sandoynni eru smáar, og longu nú er strîggið hjá teimum at fáa raksturin at hanga saman.

Sandoyingar gleða seg sjálvsagt til, at umstøðurnar hjá ungdómi og fólkinum annars verða betri, men samstundis noyðast kommunurnar at finna útvegir fyri, hvussu tær skulu megna at rinda fyri rakstrarkostnaðin av ítróttarhøllini Inni í Dal.

*vilmund@sosialurin.fo*




# Hús til sølu



## Tvíhús á Eiði, Flatabø 5

Húsini liggja væl fyri miðskeiðis í bygdini. Girðing er um húsini og eitt hugnaligt urtagarðsøki.

Grundøkið er til víddar 302 m$^2$ , og búvíddin er stovuhædd 50 m$^2$, loft 35 m$^2$ og hálvur kjallari.



## Hús á Stykkinum

Frálíku húsini Inni í Bø 4 við útsýni oman á Leynasand og út á sjógv eru í tveimum hæddum á ca. 160 m$^2$. Húsini eru frá u. 1978. Grundøkið er 1385 m$^2$.

*Nærri fæst at vita um húsini á www.hentze. fo og við at ringja til okkara á tlf. 619191.*

ADVOKATSKRIVSTOVAN
HENTZE
TURIÐ DEBES HENTZE
adv. og mediator

Tróndargøta 19, Postboks 236, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 619191, Fax: 311490
**www. hentze.fo**